

# Svii deyður av H1N1

Influensa A ella H1N1 hevur kravt tað fyrsta mannalívið í Svøríki. Talan er um ein mann í tríatiárunum. Maðurin, sum búði í býnum Uppsala, doyði heima við hús fríggjakvøldið. Læknin fekk alt fyri eitt illgruna um, at talan var um H1N1, tí hóast sjúkueyðkennini vóru nakað ógreið, bendu tey á, at talan kundi vera um H1N1, skrivar TT. Seinni varð líkið kannað á sjúkrahúsinum í Uppsala, og tann kanningin staðfesti, at maðurin var deyður av H1N1. TT skrivar, at fýra aðrir sviar eru meint raktir av H1N1. Teir liggja á Karolinska Sjukhuset í Stockholm, har eftirgjørd lungu halda teimum á lívi.

# Lítið ferðsluóhapp á Skálatrøð

Í morgunmeldrinum í morgun var eitt lítið ferðsluóhapp á Skálatrøð í Havn. Ein bilur kom koyrandi yvir móti parkeringsplássinum á Skálatrøð, tá ein annar bilur kemur av Bøgøtu og koyrir út á vegin, beint fram fyri hin bilin, og so stoyta teir saman.

Eingin fólkaskaði stóðst av hendingini, men bilurin, ið koyrdi út av Bøgøtu, fórst eitt sindur illa.

Løgreglan var á staðnum, og kannaði málið. Treytaleys víkiskylda er, tá koyrt verður út av Bøgøtu, so helst fær eini førarin eina heilsan frá fútanum.

*-rn*





*Myndir: Jens Kristian Vang*




# Hava framvegis ætlanir við Nornagesti og Columbus

**Seinastu tíðina hava ísfiskatrolararnir Nornagestur og Columbus úr Vestmanna ligið við bryggju. Men teir eru ikki lagdir endaligt. Reiðaríið hevur framvegis ætlanir við bátunum**

FISKIVINNA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

P/F Vár í Vestmanna hevur framvegis ætlanir við ísfiskatrolarunum Columbus og Nornagesti. Tað sigur Tummas Christophersen, útgerðarmaður, uttan at vilja koma nærri inn á, júst hvørjar ætlanir eru við bátunum.

Seinastu tíðina hevur graml verið at hoyrt um, at báðir ísfiskatrolararnir skuldu verið endaliga lagdir, tí tað ikki longur loysti seg at fiska við teimum. Báðir eru teir bygdir í 1961, og eru sostatt als ikki í nýggjara – og meira effektiva – partinum av flotanum.

Men hóast bátarnir hava ligið á Vestmanna eina tíð nú, eru bátarnir ikki endaliga lagdir, sigur Tummas Christophersen, og sigur, at kanska verður meira at frætta seinni.

*Hóast ísfiskatrolararnir Columbus og Nornagestur hava ligið á Vestmanna eina tíð, eru teir ikki lagdir endaligt.*
*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

# Tóku stjóran á bóli

Starvsfólk í Føroya Banka tóku í morgun forstjóran, Janus Petersen, á bóli, tá tey í loyndum høvdu skipað fyri einum drekkamunni í kantinuni í Føroya Banka á Húsagøtu. Janus Petersen fylti 50 ár fyrr í vikuni, og í morgun hildu starvsfólkini dagin saman við honum.

Janus Petersen segði nøkur orð, og takkaði fyri góðu tíðina, hann hevur havt saman við starvsfólkunum í Føroya Banka.

Janus Petersen hevur prógv í bæði løgfrøði og búskaparfrøði frá Universitetinum í Keypmannahavn. Janus Petersen hevur 18 ára royndir við bankaarbeiði.

Áðrenn hann kom í Føroya Banka í 1994, var hann leiðari á kredittdeildini hjá Føroya Sparikassa. Eisini var hann í fýra ár deildarstjóri í BRF Kredit.

Janus Petersen er formaður í Trygd, Skyn og FB Holding og nevndarlimur í Elektron. Harumframt er hann formaður í Felagnum Peningastovnar og nevndarlimur í Arbeiðsgevarafelagnum Fyri Fíggjarstovnar.

*-rn*



*Mynd: Jens Kristian Vang*